## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# – Gott at vera á Skipasmiðjuni




*Martin Tausen í Hovi, sum gongur í 9. b í Vágs skúla, er í starvsvenjing á Tórshavnar Skipasmiðju*

**STARVSVENJING**
*Rani Nolsøe Johannessen*

Sum fleiri av næmingunum í Vágs Skúla, valdi Martin Tausen í Hovi at fara í starvsvenjing í Havn. Vit fóru ein túr framið á Tórshavnar Skipasmiðju har Martin er í starvsvenjing og spurdu hann nakrar spuningar.

*Hví valdi tú just hetta arbeiðisplássið?*

Eg vildi royna okkurt, sum hevur eitt sindur av mínum áhuga, og valdi so skipasmiðjuna.

*Hvat dámar tær at verða her?*

Tað er fínasta slag.

*Hvat hevur tú gjørt higartil?*

Arbeitt við rørum umborð á Krúnborg, sveisað, slípað og tílíkt.

*Hvat gert tú beint nú?*

Bíði til hinir eru lidnir við tað teir gera, og skulu so gera okkurt annað.

*Kundi tú hugsað tær at arbeitt við hesum í framtíðini?*

Tað veit eg ikki, tað kundi altíð hent.

*Gleðir tú teg at sleppa í skúla aftur?*

Ja, eitt sindur.

Til endans spurdu vit Martin hvussu tað er at verða í Havn. Við einum smíli segði hann at hann, helt tað verða hampuligt, men helt seg vera meira til bygdarlívið. Martin gongur 9.b í Vágs skúla.

### Dagurin í morgin

**12. januar. Reinaldur.** Týskur riddari, sum gjørdist munkur í Köln, men varð myrdur sv steinhøggarunum umleið ár 1200, tá ið hann koyrdi undir teir í arbeiðinum at byggja eina kirkju. Týskt navn, sum merkir *tann, sum hevur vald á Gudum.*




Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin

"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, ið var veitt okkum, tá ið góða mamma okkara

**Sofía Weihe**

og beiggi okkara

**Hermod Weihe**

Sørvágur

andaðust og vóru jarðað.

Gud vælsigni tykkum øll.
Heilsan við sálma 121.

*Familjunnar vegna*
**Børn og systkin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum sum á ymsan hátt hjálptu til og vístu samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma okkara

**Saloma Frederiksen**

Múla

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum á Norðoyar Røktarheimið fyri tykkara umsorgan fyri henni, tey seinastu mongu árini hon var har.
Tøkk til prestarnar Elsu Funding og Niels Paula Danielsen
Tøkk fyri orgulspæl í kapellinum.
Tøkk til degn, klokkara og organist í kirkjuni.
Tøkk til førara av líkbili og gravara.
Tøkk til sangarnar úti við grøvuna.
Tøkk til tykkum øll, sum bakaðu og hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur.
Tøkk øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Hjartaliga takk øll somul.

**Døturnar**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kistan við Karl E. Andreassen**, vanliga nevndur Karl hjá Hildu, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi heim í Kristianskirkjuni mikudagin 11. januar klokkan 18.

Jarðarferðin verður úr Kristianskirkjuni hósdagin 12. januar klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Karl, kunu lata KFUM og K eina peningagávu. Konta í Norðoya Sparikassa.

Kistan við **Rigmor Rættá,** vanliga nevnd Rigmor hjá Guttanum, fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin 11. januar klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin 12. janaur klokkan 13.

Kistan við **Mariu á Lakjuni**, Fuglafirði, fer úr kapellinum í dag klokkan 16:00.

Jarðarferðin verður úr Siloa hósdagin 12. januar klokkan 13:00.

Tey, sum vilja minnast Mariu, kunnu lata eina gávu til trúboðarvirksemi, konto í Føroya Banka.

**Martin Christiansen**, ættaður úr Fuglafirði búsitandi á Frederiksberg, andaðist mánadagin 9. januar, 74 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin 14.januar kl. 12:30, úr Bavenehøj kirke.

Kistan við **Marjettu Heinesen**, Klaksvík, fer úr kapellinum hósdagin 12. januar klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Kristianskirkjuni fríggjadagin 13. januar klokkan 13.Tey, sum vilja minnast Marjettu, kunnu lata eina gávu til Sjómanskvinnuringin; konto í Norðoyar Sparikassa.

**Svenning Danielsen**, Kaldbak, andaðist 7. januar, á Lágargarði, 87 ára gamal.

Farið verður av Lágargarði týsdagin 10. januar, klokkan 14:00

Jarðarferðin verður úr Kaldbaks kirkju, mikudagin 11. januar klokkan 13:00. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, sum vilja minnast Svenning, kunnu lata eina peningagávu til Kaldbaks kirkju. Konto í Føroya Sparikassa: 9181- 4951923.